Tórshavn 22. september 2020

**Fiskaaling 50 ár**

Hjartaliga tillukku við degnum. Tað er hugaligt at gerast 50 og í so góðum formi.

Eg havi serliga fylgt við menningini hjá Fiskaaling og starvsfólkunum har, síðani eg kom í starv hjá Granskingarráðnum. Samskiftið hevur verið nógv um hugskot til nýggjar verkætlanir, um ígongdverandi verkætlanir og um framhald av arbeiði, sum er gjørt.

Fyri mær at síggja, er talan um ein granskingarstovn, sum við miðvísum arbeiði og góðum samstarvi við nógvar partar megnar at leggja týdningarmikla vitan afturat á aliøkinum og at klekja dugnaligar granskarar, sum kunnu undirvísa og granska á almennum stovnum og taka týdningarmikil tøk í vinnuni. Hetta kunnu tit, tí tit hava nógv góð fólk í starvi, 10 við loknari ph.d.-útbúgving, og 3 ph.d.-lesandi, um eg havi talt rætt.

Tað vitna mongu og fjølbroyttu verkætlanir tykkara eisini um. Fiskaaling hevur seinastu góð 15 árini fingið fíggjarligan stuðul til 17 verkætlanir frá Granskingarráðnum. Sjey av hesum eru ph.d.-verkætlanir. Fleiri av hesum verkætlanum eru eisini stuðlaðar fíggjarliga og á annan hátt av alifyritøkum, Fróðskaparsetrinum, útlendskum grunnum og øðrum, umframt av Fiskaaling umvegis játtanina frá landinum.

Stuðul fæst langt frá til allar verkætlanir, sum stuðul verður søktur til. Tí er hetta bara toppurin av teimum verkætlanum og verkætlanarhugskotum, sum tit hava arbeitt við.

Tit hava harafturat nógvar verkætlanir, sum tit fremja sjálvi ella við stuðli frá øðrum enn okkum.

Tit hava sett tykkum granskingarmál, sum ikki eru avmarkað til Føroyar, tey eru viðkomandi fyri allan heimin. Tit hava í fleiri ár arbeitt tvørturum landamørk við granskarum í grannalondum okkara og aðrastaðni við. Tit eru partur av toymi, sum hevur fingið stuðul frá NordForsk til eitt Nordic Centre of Exellence við heitinum SureAqua. Har eru 40 partar við úr norðurlondum. Í hesum geva tit øðrum minst líka nógv, sum vit fáa aftur í Føroyum.

Tit eru partur av Horizon 2020 stuðlaðari verkætlan við heitinum AquaVitae. Har eru tit partur av einum toymi við 35 pørtum úr 15 londum, harav tit, Ocean Rainforest og Syntesa/Sjókovin eru føroysku partarnir, umframt alifyritøkur sum undirveitarar.

Tit hava frá byrjan verið við í iNOVA og tit eru høvuðskraftin í granskingini har. Fleiri starvsfólk tykkara hava sína dagligur gongd har og eru har við til at byggja brýr millum granskingarumhvørvið og vinnulívið, sum var eitt av endamálunum við iNOVA.

Tit duga eisini væl at seta við, so tað eru skikkaðir kandidatar til gransking. Starvsfólk hjá tykkum hava vegleitt fleiri studentum, bæði føroyskum og útlendskum, og harvið givið teimum gott í beinið á yrkisleið teirra. Tit hava sum ein av fáu støðunum í Føroyum hýst Erasmus+ studentum úr Europa. Vónandi fara vit at síggja meira av hesum í framtíðini.

Tit gera nógv burturúr at miðla tykkara gransking og arbeiði yvirhøvur og eru altíð fús at vera við í felags tiltøkum hjá granskingarumhvørvinum, ikki minst á Vísindavøku, sum tit eldhuga luttaka í á hvørjum ári. Tit miðla har til stór og smá um alt landið.

Tórshavn 22. september 2020

Eisini á Aliráðstevnuni eiga tit ein alt størri lut við tykkara framløgum, á seinastu ráðstevnuni í mars, beint áðrenn korona brast á, bóru tit meginpartin av stevnuni fakliga. Hetta er tekin um stovn í bestu árum.

Tað eru longu nógv sagt í dag, og nógv meira stendur í bókini um Fiskaaling, sum verður løgd fram í dag. Eg gleði meg at fara at blaða og lesa.

Enn einaferð: Hjartaliga tillukku við degnum. Drívið á!

Annika Sølvará
Granskingarráðið